# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Heppin val til ársins leiðarar

Tað er vorðið "in" at kjósa ársins av hesum og hasum slag. Tað veri seg ársins føroying, herðaklapp, rósu, virki, leiðara osfr. Eisini í Miðlahúsinum hava vit kosið ársins mann og kvinnu og kjakara. Hetta varð seinni broytt til at kjósa ársins listafólk.

Tað vilja altíð vera ymsar meiningar um tað skilagóða í at kjósa ársins fólk innan ymisk fakøki og yrki. Onkur heldur, at vit eru so fá her á landi, at ringt er at halda fram við slíkum kjósingum ár undan ári. Tó so – at kjósa ársins er vorðið ein partur av gerandisdegnum og fer helst at halda fram.

Eitt av teimum ársins tiltøkunum, sum man vera tað, ið hevur einamest áhuga millum manna, er tiltakið hjá fyritøkuni Synergi um at velja ársins leiðara. Í fyrstani var bara talan um ársins privata leiðara, men í fjør varð hetta tiltakið broytt til eisini at fevna um ársins leiðara innan tað almenna. Avgjørt skilagott at víðka henda karm, tí sjálvandi hava leiðarar í tí almenna sektorinum alstóran týdning fyri ikki bert starvsfólkini á staðnum og tann stovn ella arbeiðspláss tey umboða men so sanniliga eisini fyri allar føroyingar. Tí almennir leiðarar eru við til at umsita skattapeningin hjá okkum øllum. Tess betri leiðarar tess meira fáa vit øll burtur úr skattakrónunum.

Á ársins leiðaradegi vóru Jon Danielsen frá byggifyritøkuni Articon og Tórmóður Stórá frá psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum valdir ársins leiðarar. Hóast onnur góð evni vórðu í uppskoti, so eru umrøddu persónar eitt gott val. Byggivinnan hevur ment seg nógv seinastu árini og her hava okkara egnu fólk víst, at vit vilja og duga. Byggivinnan hevur verið í besta blóma leingi, tó at kreppa nú merkist. Tað er nettupp eisini í ringum tíðum, at leiðarar skulu vísa hegni til umstillan og til at fáa sum mest burtur úr tí tilfeingi, sum er. Ì samrøðu við Rás2 nevndi Jon Danielsen, at nettupp trongar tíðir eru stór og mennandi avbjóðing. Tað eru fá ár síðani, at Sofus Olsen, sáli, sum varð kosin ársins føroyingur av Miðlahúsinum, tók fram góðu leiðslu- og arbeiðsevnini hjá júst nýkosna ársins leiðara og sipaði her til, hvussu væl hann hevði handfarið byggingina av listasavni á Sandi.

Ársins leiðari innan tað almenna, Tórmóður Stórá frá psykiatriska deplinum á LS var eisini eitt gott val. Sjálvandi byggir hansara arbeiði og royndir eisini á herunum hjá øðrum, men Tórmóður hevur víst stórt hegni til í tí almenna rúminum at varpa ljós viðurskiftini hjá føroyingum við psykiatriskum trupulleikum. Eitt økið, sum tíverri leingi hevur verið tagt burtur av samfelagnum og har vit fyri ikki so mongum árum síðani sendu hesi fólk til Danmarkar.

Nú hevur so eydnast at fáa eyguni upp fyri hesum bólki av sjúklingum í føroyska samfelagnum og gera tey til ein náttúrligan part av okkara samfelag.

Vit ynskja teimum báðum tillukku, men vit ynskja eisini øllum teimum, sum arbeiða saman við kosnu ársins leiðarum tillukku, tí hesin heiður er so sanniliga eisini teirra. Uttan tey var eingin ársins leiðari at velja millum.

**Sosialurin**

## Endurføðingin

RICHARD DANIELSEN



Tá ið Nicodemus kom til Jesus á sinni og segði: **"Rabbi! Vit vita, at Tú ert lærari, komin frá Gudi; tí eingin kann gera hesi tekin, sum Tú gert, uttan Gud er við honum."** Svaraði Jesus við at fara beint til tað mest grundleggjandi í kristindóminum: **"Sanniliga, sanniliga, sigi Eg tær: Verður ein ikki føddur av nýggjum, kann hann ikki síggja ríki Guds."** Seinni tekur hann uppaftur: **"Tit mugu føðast av nýggjum!"**

Hvussu verður ein føddur av nýggjum? Hvussu verða vit fødd andaliga? Tá vit vóru fødd inn í henda heim gjørdust vit børn, áðrenn høvdu vit verið fostur. Andaliga verða vit eisini børn, tá ið vit verða fødd av nýggjum. Jóh. 1, 11-13 sigur: **"Hann kom til Sítt egna, men Hansara egnu tóku ikki ímóti Honum. Men so mongum sum tóku ímóti Honum, gav Hann mátt at verða børn Guds - teimum, ið trúgva á navn Hansara; tey eru fødd, ikki av blóði, heldur ikki av holds vilja, heldur ikki av mans vilja, men av Gudi."** Tað er sostatt við móttøku ein gerst eitt gudsbarn.

Nicodemusi tyktist tað torført tá, ið Jesus fór at tala um ta nýggju føðingina. Men vit síggja av tí, sum vit lósu júst nú, at tað er ikki torført. Jesus fór eisini beinan vegin at tala við Nicodemus um frelsuna, og har kemur eitt tað kendasta versið, vit hava í Bíbliuni, Jóh. 3, 16:

**"Tí so elskaði Gud heimin, at Hann gav Son Sín, hin einborna, fyri at hvør tann, ið trýr á Hann, skal ikki fortapast, men hava ævigt lív."**

Í fyrsta brævi sínum sigur Jóhannes hetta í triðja kapitli, fyrsta versi: **"Síggið, hvussu stóran kærleika Faðirin hevur víst okkum, at vit skulu kallast børn Guds! - Og vit eru tað! Tí kennir heimurin okkum ikki, tí hann kennir ikki Hann."** Tí kennir heimurin okkum ikki. Her síggja vit eina av høvuðslæru Bíbliunar: Tað eru tveir flokkar, børn heimsins og børn Guds. Tey, sum eru født av nýggjum og tey, sum ikki eru fødd av nýggjum. Teimum, sum eru farin yvir um frá deyða til lív, og tey, sum enn eru í tí myrkri, sum vit øll ganga í av náttúru. Í hesum sama kapitlinum síggja vit nøkur eyðkenni fyri tey, sum eru fødd av nýggjum:

**"Av hesum kennast børn Guds og børn Djevulsins: Hvør tann, ið ger ikki rættvísi, er ikki av Gudi, og líka lítið tann, ið elskar ikki bróður sín."** V. 10 **"Vit vita, at vit eru farin yvirum frá deyða til lív, tí vit elska brøðurnar; tann, ið elskar ikki, verður verandi í deyðanum."** v.14. **"Vit eru av Gudi. Tann, ið kennir Gud, hoyrir okkum; tann, ið ikki er av Gudi, hoyrir okkum ikki. - Av hesum kenna vit anda sannleikans og anda villunnar."**Kap.4,6. **"Tann, ið trýr á Son Guds, hevur vitnisburðin í sær sjálvum."** Kap.5,10

So nøkur av kennimerkjum hins endurfødda eru: Hann ber seg rætt at, hann elskar, hann lurtar eftir orði Guds og hann eigur ein vitnisburð í hjarta sínum.

Í triðja kap. aftur, skulu vit taka nøkur skriftstøð fram aftrat, sum tykjast torfør at skilja og í fyrstu atløgu kunnu tykjast, sum tey mótsiga øðrum í brævinum og í Bíbliuni annars. Men verður hugt nærri at teimum, so vísa tey júst tann djúpa sannleikan um endurføðingina:

**"Hvør tann, ið verður verandi í Honum, syndar ikki; hvør tann, ið syndar, hevur ikki sæð Hann og kennir Hann ei heldur. Børn míni! Latið ongan villleiða tykkum! Tann, ið ger rættvísi, er rættvísur, eins og Hann er rættvísur. Tann, ið ger synd, er av Djevulinum; tí Djevulin hevur syndað frá upphavi. Til tað er Sonur Guds opinberaður, at Hann skal gera verk Djevulsins til einkis. Hvør tann, ið føddur er av Gudi, ger ikki synd; tí sáð Hansara verður verandi í honum; hann kann ikki synda, tí hann er føddur av Gudi."** 1. Jóh. 3,6-9.

Hvør tann ið verður verandi í honum syndar ikki. Hvat er nú hetta, gerast vit syndafríð, tá ið vit eru frelst. Nei, vit vita, at so er ikki, vit snáva øll og synda. Vit síggja at sami ápostul lærir, at vit synda og treingja til at játta syndir. Tað síggja vit, um vit bara lesa endan av fyrsta kapitli í brævinum og byrjanina í øðrum kapitli. Nei, tað sum her kemur fram, er sannleikin um endurføðingina. Tá ið vit tóku ímóti, sum vit lósu í evangeliinum, vóru vit fødd av nýggjum. Tá føddist eitt nýtt menniskja í okkum, sum aldri fer at synda. Tað hevði verið ræðuligt um tað nýggja menniskja í okkum syndaði, so stóu vit aftur sum skuldarar fyri Gudi, tá hevði verið illavorðið, men tað fer ikki at henda. Tí:

**"Hvør tann, ið føddur er av Gudi, ger ikki synd; tí sáð Hansara verður verandi í honum; hann kann ikki synda, tí hann er føddur av Gudi,"** lósu vit. Tað gamla menniskja harafturímóti er óumbroytt, og syndar.

Tey frelstu hava sostatt tvær náttúrur, tað gomlu, sum vit vóru fødd við og tað nýggju, sum vit fingu við at móttaka frelsuna í Kristusi og vóru fødd av nýggjum. Tann, sum er í hesi støðu, er ein nýggjur skapningur í Kristusi, og tí fer tann broytingin fram, sum vit hava sæð júst nú við at grunda á eyðkennini, sum ápostulin nevnir. Tað er ein bardagi ímillum hesar báðar náttúrur, tann nýggja eigur at vinna á tí gomlu. Tí ræður um at geva tí nýggju náttúruni nógv at eta, so hon kann sigra á tí gomlu. Tað gera vit við at geva henni andaliga føði, orð Guds.

Gera vit tvørtur ímóti og fóðra tað gomlu náttúruna við øllum tí, sum hesin heimur hevur at bjóða, fer hon at sigra, og tá stendur illa til. Tá er okkurt álvarsamt galið, og vit mugu fáa tingini í ordan aftur við Gud sum skjótast, tí tá er samfelagið brotið við hann. Er ongantíð nøkur broyting farin fram, eru tað ikki tvær maktir ið stríðast við hvørja aðra í okkum, men tann eina gamla náttúran, sum dominerar í lívi okkara, er neyðugt at søkja Gud í álvara, tí tá er at vera bangin fyri at ein ikki er endurføddur.

Tú mást ikki troysta teg við, at tú ert endurføddur sum nýføðingur við at vera áslettur, sum summi læra. Tann læran hevur onga heimild í Bíbliuni og kann ikki samsvara við hetta, sum eg havi drigið fram úr Jóhannesar evangelii og 1. brævi. Ein nýføðingur kann hvørki trúgva ella vera vantrúgvandi, tí sum vit hava sæð, endurføðingin fer fram við móttøku við trúgv. Nýføðingarnir hoyra Harranum til, um teir eru áslettir ella ikki, tað ger ongan mun, ríki Guds hoyrir slíkum til, sum Harrin Jesus segði.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.